# Eidesgaard villeiðir danir

*Høgni Hoydal heldur, at Jóannes Eidesgaard, í samrøðu við tíðindastovuna Ritzau kemur við villeiðandi útsagnum, ið kunnu skaða fullveldisætlanina*

John Johannessen

Høgni Hoydal sendi sunnudagin Jóannesi Eidesgaard opið bræv við áheitan um at virða fólkaræðisligu mannagongdirnar í fullveldismálinum, hóast hann ikki tekur undir við stevnumiðum landsstýrissins.

Høgni Hoydal er ónøgdur við, at Jóannes Eidesgaard hevur sagt fyri donsku tíðindastovuni, Ritzau, at landsstýrið hevur ein minniluta av føroya fólki aftan fyri seg í fullveldisætlanini.

### Sigur ósatt

Høgni Hoydal heldur tað vera gott, at Jóannes Eidesgaard sigur sína hugsan um framtíðarstøðu Føroya. Men hann vísir á, at tað eru ósannindi, Jóannes ber fram, tá hann við danskar fjølmiðlar sigur, at minnilutin av Føroya fólki tekur undir við føroyskum fullveldi.

Somuleiðs heldur heldur Høgni Hoydal hetta vera rættuliga álvarsamar pástandir fyri ein andstøðuleiðara og fólkatingsmann at seta fram.

– Tú hevur hevur farnu dagarnar í fjølmiðlunum fleiri ferðir sátt iva um, hvørt landsstýrið fylgir teimum demokratisku mannagongdunum í sjálvstýrismálinum.

– Í donskum fjølmiðlum er eisini ein samrøða við teg um hetta mál um vikuskiftið. Yvirskriftin hjá Ritzau og á tekstvarpinum hjá Jyllands Posten á TV3 er »Mindretal bag suverænt Færøerne«. Greinin gevur lesarunum ta fatan, at landsstýrið fer til samráðingar við donsku stjórnina við einum minnuluta aftan fyri seg, sigur Høgni Hoydal í brævinum til Jóanes Eidesgaard.

### Má virða fólkaræðið

Landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum sigur í brævinum til Jóannes Eidesgaard, at hann kennir tað sum eina skyldu at skriva Jóannesi brævið og í tí koma við einari inniligari áheitan á hann um at virða fólkaræðisligu mannagongdirnar, hóast hann ikki tekur undir við stevnumiðum landsstýrissins.

– Sum landsstýrismaður í sjálvstýrismálum havi eg ábyrgd mótvegis løgtinginum og Føroya fólki at fyrireika samráðingarnar við donsku stjórnina. Saman við løgmanni og landsstýrinum er tað mín ábyrgd at royna at fáa eitt so gott samráðingarúrslit, sum gjørligt. Eitt úrslit, sum bæði Føroya Løgting og allir føroyskir veljarar síðani skulu taka støðu til.

– Hetta er eitt tað týdningarmesta málið í politisku søgu Føroya, og landsstýrið hevur tí lagt dent á treytaleyst at fylgja øllum demokratiskum mannagongdum, vísir Høgni Hoydal í brævi sínum á.

### Væl lýst

Jóannes Eidesgaard hevur seinastu tíðina javnan víst á, at almenningurin fær alt ov lítið at vita um fullveldisætlanina, við tað, at uppritið til samráðingarnar við donsku stjórnina, ið er latið uttanlandsnevndini, verður hildið loyniligt.

Men Høgni Hoydal ger í brævi sínum til Jóannes Eidesgaard greitt, at tað neyvan finnst nakað mál, ið er so væl fyrireikað, viðgjørt og lýst, sum samráðingarnar.

Høgni Hoydal setir í hesum sambandi upp fýra grundgevingar fyri sínum sjónarmiðið um, at málið er væl lýst og væl viðgjørt:

– Løgtingið samtykti í oktober við 19 atkvøðum fyri - t.e. 60 prosent - at landsstýrið skuldi fara undir at fyrireika og samráðast um ein sáttmála, ið skipar Føroyar sum eitt land við fullveldi. Longu undir teirri viðgerðini høvdu vit eisini óformligar fundir við andstøðuna til tess at royna at greiða ósemjurnar.

– Grundlógararbeiðið fer eisini fram sambært løgtingssamtykt, og allir flokkar eru umboðaðir í grundlógarnevndini.

– Tá Hvítabók varð skrivað, kunnaðu vit eisini regluliga uttanlandsnevndina um hetta arbeiði. Tá Hvítabók var liðug, varð uttanlandsnevndin eisini kunnað samstundis sum landsstýrið, áðrenn bókin varð almannakunngjørd. Síðani hava vit havt aðalorðaskifti um Hvítubók og kunningarfundir kring landið.

– Áðrenn samráðingaruppleggið varð skrivað og sent uttanlandsnevndini, høvdu vit fleiri óformligar fundir, har andstøðuflokkarnir vórðu kunnaðir um allar ætlanir landsstýrissins. Vit gjørdu alt, vit kundu, fyri at fáa Javnaðarfloksins sjónarmið við í uppleggið, sigur Høgni Hoydal í seinastu grundgevingini.



Jóannes Eidesgaard kom illa fyri av skeivu yvirskriftinin hjá Ritsau í vikuskiftinum

### Fólkaræðislig mannagongd

Høgni Hoydal vísir í brævinum til Jóannes Eidesgaard á, at nú uttanlandsnevndin viðger uppritið, fer landsstýrið sjálvsagt at kunna hana um alt. Og hann vónar, at nevdin vil brúka sín fólkaræðisliga rætt at geva landsstýrinum ráð, áðrenn samráðningarnar byrja.

Landsstýrismaðurin ger greitt, at tá uttanlandsnevndin er liðug at viðgera uppritið, verður tað almannakunngjørt.

– Uttanlandsnevndin fer eisini at verða kunnað bæði undir samráðingunum og eftir samráðingarnar. Og tá samráðingarnar eru lidnar, verður sáttmálin lagdur fyri løgtingið, har allir løgtingsmenn kunnu velja antin at taka undir við honum ella at vraka hann. Síðani verður hann lagdur til fólkaatkvøðu, har flokkarnir eisini kunnu mæla sínum veljarum til at atkvøða fyri ella ímóti.

Høgni Hoydal sigur seg ikki duga at síggja, hvussu mannagongdin í sjálvstýrismálinum kann vera meira fólkaræðislig enn tað sama.

### Fólkaræðið mangan vanvirt

Høgni Hoydal vísir Jóannesi Eidesgaard á, at Jóannes sjálvur veit, at mannagongdirnar ikki altíð hava verið so fólkaræðisligar, tá stórar avgerðir eru tiknar. Somuleiðis sigur hann seg rokna við, at Jóannes er samdur við sær í, at vit aldri mugu endurtaka tær mongu fólkaræðiliga mótstríðandi avgerðirnar, sum eru tiknar uttan um føroyska veljaran.

– Eg hugsi til dømis um gongdina frá 1946 til 1948, tá vit fingu eina heimastýrislóg, sum Føroya fólk aldri slapp at taka støðu til á fólkaatkvøðu.

– Eg hugsi eisini um framferðina í 1959, tá landsstýrið var í Keypmannahavn og góðkendi NATO-støðina og hartil gjørdi avtalu um stórar peningainnspræningar úr Danmark. Hetta hendi alt, uttan, at hvørki løgtingið ella veljarin slapp at taka støðu, sigur Høgni Hoydal og vísir Jóannesi Eidesgaard á, at eins og hann sjálvur veit, er tað sama eisini hent í nýggjari tíð.

– Eg hugsi eisini um tíðarskeiðið frá 1990 til 1996, tá tú sjálvur sat sum landsstýrismaður. Hesi árini gjørdi landsstýrið heilar seks ferðir avtalur við ríkisstjórnina, sum skuldarbundu landskassan fyri tilsamans 2,8 milliónir krónur. Harafturat settu hesar avtalur løgtingið undir umsiting. Kortini varð løgtingið hvørkið kunnað áðrenn samráðingarnar, undir samráðingunum ella áðrenn avtalurnar vórðu endaliga undirskrivaðar. Landsstýrið gjørdi alt hetta uttan nakrantíð at spyrja løgtingið eftir, sigur Høgni Hoydal.

Eisini vísir Høgni Hoydal á, at Føroya fólk aldri slapp at taka støðu til nakra av hesum avtalum, hóast tær høvdu sera álvarsligar avleiðingar fyri bæði núverandi og komandi ættarlið.

– Vit vita báðir, at umstøðurnar vóru sera truplar hesi árini. Men kortini mugu vit staðfesta, at ongar fókaræðisligar mannagongdir vórðu hildnar, sigur Høgni Hoydal við Jóannes Eidesgaard í brævi sínum.

### Danski yvirvaldsrætturin orsøkin

Landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum sigur, at vit vita, at orsøkin til, at føroyskir myndugleikar soleiðis kundu setast til viks er, at yvirvaldsrætturin yvir Føroyum ikki liggur hjá føroyska fólkinum, men hjá danska ríkisvaldinum. Og tí skilir Høgni Hoydal óhugnaligu støðuna, Jóannes Eidesgaard og aðrir tá vóru í.

– Endamálið við sjálvstýrisætlan landsstýrissins er ikki minst at forða fyri, at hetta kann henda aftur. Í tinginum eru 19 limir, sum taka undir við hesi ætlan. Teir ynskja, at vit gera ein sáttmála millum Føroyar og Danmark, har londini eru javnbjóðis sáttmálapartar, og har Føroyar ikki eru undirskipaðar Danmark.

– Tú tekur eftir øllum at døma ikki undir við hesi ætlan. Og tað hevur tú rætt til. Tú hevur eisini rætt til, alment at venda tær ímóti henni, sigur Høgni Hoydal við Jóannes Eidesgaard.

### Má rætta misskiljingina

Høgni Hoydal vísir enn einaferð á, at Jóannes Eidesgaard fer út um mark, tá hann sigur ætlan landsstýrissins vera ódemokratiska. Hann vónar, at tíðindini, sum bórust í donskum fjølmiðlum um vikuskiftið vóru ein misskiljing, og heitir hann á Jóannes Eidesgaard um at rætta mistakið sum skjótast — um talan er um eitt mistak.

Landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum vísir á, at slíkt kann gera tað munandi torførari hjá landsstýrinum at fáa eina góða avtalu til frama fyri alt Føroya fólk, og so verður eingin vinnari, men føroyski veljarin verður tapari.

# Jóannes varð skeivt endurgivin

*At tíðindastovan Ritzau um vikuskiftið endurgav Jóannes Eidesgaard hevur enn eina ferð skapt rumbul í fullveldismálinum*

John Johannessen

Ein skeiv yvirskrift skapti um vikuskiftið rumbul í fullveldismálinum. Burturúr samrøðu við Jóannes Eidesgaard gjørdi tíðindastovan Ritzau eina niðurstøðu um, at meiriluti ikki er í løgtinginum fyri sjálvstýrisætlan landsstýrisins.

Henda niðurstøða varð vald til yvirskrift, ið ljóðaði »Intet flertal bag færøske forhandlinger um suverænitet«.

Yvirskriftin gjørdi Høgna Hoydal, landsstýrismann í øðini, við tí úrsliti, at hann setti seg at skriva Jóannesi Eidesgaard eitt bræv, har hann heitti á hann, um at gevast við at siga ósannindi um fullveldismálið og at villeiða danir.

Samrøðuna við Jóannes Eidesgaard hevði føroyska Randi Mohr, sum umboðar Ritzau í Føroyum skrivað, men hon hevði ikki skrivað nevndu yvirskriftina. Hon var broytt á Ritzau í Danmark, áðrenn hon fór út til miðlarnar.

Randi Mohr heitti á Ritzau um at broyta yvirskriftina, og hevur tíðindastovan nú tikið greinina aftur og sent nýggja út, við yvirskriftini »Der er flertal, men ikke bredt«

Jóannes Eidesgaard sigur seg fegnast um, at mistakið er rættað av rætta viðkomandi, so hann sjálvur slapp undan at fara út í miðlarnar at rætta yvirskriftina. Tá hevði vandin nevniliga verið, at enn meiri rumbul kom í.

Jóannes Eidesgaard heldur tað ikki vera ráðiligt at gera stórvegis viðmerkingar til brævið frá Høgna Hoydal, sum hann í ávísum førum fer heldur langt.





Gamla skonnartin, sum fuglfirðingar keyptu frá porkeningum, sakk brádliga sunnudagin. Ætlanin er, at skipið skal brúkast til sjósavn, men nær tað verður er eitt sindur óvist í løtuni **Mynd: Skipalistin 2000**

# Kyrjasteinur sakk

*Kyrjasteinur, sum fuglfirðingar keyptu til sjósavn, sakk seinnapartin sunnudagin. Gamla skonnartin lá fyri teym úti á fjørðinum tá hon tók at søkka*

Sveinur Tróndarson

Sunnudagin sakk skonnartin Kyrjasteinur, sum fuglfirðingar keyptu frá porkeningum.

Báturin, sum lá fyri teym á Fuglafirði tók brádliga at søkka, og áðrenn menn fingu gjørt nevnivert var hann farin til botns.

Tað er grunnurin Karvatoftir, sum eigur Kyrjastein. Teir keyptu hann frá porkeningum fyri nøkrum árum síðani.

Ætlanir eru í Fuglafirði at gera eitt sjósavn og av tí at Kyrjasteinur er einasta skonnart, sum er eftir í flotanum, varð avgjørt, at hann aftur skuldi til bygdina.

– Fuglfirðingar lótu Kyrjastein byggja í Korsør í 1937, sigur Óla Hendrik á Fløtum, sum sambært Skipalistanum 2000 stendur at hava ábyrgdina av grunninum Karvatoftir.

Óla Hendrik veit ikki hvussu nú verður við skonnartini.

– Tryggingin eigur skipið, sum tað liggur nú, so tað verður teirra avgerð, hvat nú skal henda, sigur hann.

Kyrjasteinur var tryggjaður fyri 300 túsund krónur nú hann sakk.

# Ferðsluóhapp á Gálganum

*Eingin fólkaskaði hendi, tá ein bilur fór út av vegnum norðanvert Gálgan millum Tvøroyri og Øravík, men bilurin fekk stóran skaða*

Sveinur Tróndarson

Eitt ferðsluóhapp hendi á Tvøroyri um vikuskiftið. Ein bilur, sum kom koyrandi suðureftir, móti Øravík, fór á glið beint norðanvert Gálgan og fór út av vegnum.

– Bilurin fekk stóran skaða, men maðurin slapp so nøkunlunda snikkaleysur, verður sagt av løgreglustøðini á Tvøroyri.

Sýslumaðurin í Suðuroynni sigur við Sosialin, at bilførarin hevur verið serliga heppin í óhappinum.

– Bilurin er farin einar 100 metrar lutvíst í leysari luft og eisini er hann rullaður runt fleiri ferðir, men kortini er hann sloppin við einum lítlum heilaskjálvta og einum snuddi á nøsini.

Har bilurin fór út av, er slætt, men bleytt. Tað er kanska orsøkin til, at bilførarin er sloppin so snikkaleysur, sum hann gjørdi frá óhappinum.

– Men hann var so skitin, sum var hann komin beint úr kolanáminum av tí leysu moldini í vegjaðaranum, sigur sýslumaðurin at enda.

# Friðarligt vikuskiftið kring alt landið

*– Okkurt hissini ferðsluóhapp, men annars er einki hent, verður sagt av løgreglustøðunum kring landið*

Sveinur Tróndarson

Tað er ikki so ofta at tað hendir, men hetta vikuskiftið fer í bókina, sum eitt av teimum friðarligu.

Líkamikið hvagar vit ringdu í gjár, var niðurlagið tað sama.

– Her er einki hent av nøkrum. Okkurt smávegis ferðsluóhapp, annars einki.

Í Klaksvík var púra friðarligt, hava vit skilt. Hóast nógvur kavi kom niður leygardagin, so hevði hann kortini ikki fleiri ferðsluóhapp við sær, verður sagt úr Klaksvík.

Men tað hevði kavin harafturímóti í Eysturoynni.

Har hendu ikki færri enn átta ferðsluóhapp um vikuskiftið. Tvey teirra fríggjadagin, restin leygardagin.

– Men talan var um smá ferðsluóhapp í øllum førum, verður sagt úr Runavík.

Løgreglan í Miðvági var tann einasta, sum fekk klørnar í ein rúsdrekkafórara. Hann varð tikin um trýtíðina sunnumorgunin.

Umframt tað høvdu teir eisini liggjandi gest - ein, sum ikki vann upp hús av egnari megi. Hann fekk ein blund á støðini men slapp út aftur tá hann var betri førur at ganga.

# www.politi.fo

*Nú ber eisini til at fáa upplýsingar um løgregluna, løgregluútbúgvingina og um arbeiði hjá løgregluni um internetið*

Sveinur Tróndarson




Í seinastu viku kom føroyska løgreglan á internetið.

Heimasíðan eitur www.politi.fo og har ber til at síggja tað, sum er vert at vita um løgregluna.

Har finnast upplýsingar um løgregluna sjálva, arbeiði hennara og m.a. eisini um hvussu ein kann gerast løgreglumaður.

Uni Vestureið, løgregluovasti í Føroyum sigur, at endamálið við heimasíðuni er, at fylgja við tíðini..

– Fólk vilja fegin hava atgongd til upplýsingarnar allar tíðir á døgninum og tað fáa tey á henda hátt. Nú sleppa tey fra´at ringja til okkara at spyrja um nær píkarnir skulu av, ella hvat tað kostar at skifta pass. Tað fáa tey at vita á netinum, sigur Uni.

Í fyrstani verður farið heldur varisliga fram, sigur Uni, sum kortini leggur afturat, at heimsíðan verður útbygd við tíðini.

»Føroyska løgreglan« er triðja løgregluøkið í danska ríkinum, sum kemur á netið.

Hetta dámar Una væl, tí tað vísir, at føroyingarnir fylgja væl við í menningini.

Málið á heimasíðuni er danskt, og tað hevur stovnurin fingið okkurt skotið fyri.

– Men tað hevur sína náttúrligu frágreiðing. Stovnurin er danskur og tí er stovnsmálið danskt, men vit tosað føroyskt, skemtar Uni.

Í verandi løtu ber ikki til hjá øllum at sleppa inn á heimasíðuna.

Nøkur teirra, sum brúka Netscape Navigator sleppa ikki inn á heimasíðuna, og boðini frá løgregluni eru, at uppgraderað til ein nýggjari »browsara«, sum tað eitur á teldumálið, men tað er ikki ráðiligt hjá øllum.

Tey, sum brúka Explorer browsara hava ikki trupulleikar at sleppa inn á heimasíðuna hjá løgregluni.



TILBOÐ AV FÓTBÓLTS-SKÓM

PUMA fótbóltsskógvar
fyrr 5 99.-
NÚ 348.-

NIKE ZOOM fótbólts-skógvar
fyrr 899.-
NÚ 499.-

PUMA KING graslíkis-skógvar
fyrr 899.-
NÚ 449.-

ÍTRÓTTUR • SMS • Tel. 31 51 77